Filadelfia

*„Himmal á jørð“*

# *Tað gamla og tað nýggja menniskja!*



Vit eru øll kend við orð Jesusar til Nikodemus, at um ein ynskir at síggja Ríki Guds, so má ein føðast av nýggjum. Vit trúgva orðinum í Rómbrævinum, at um tú við hjartanum trýrt, at Gud reisti Jesus upp frá teimum deyðu, og við munninum játtar Jesus sum Harra, so skalt tú verða frelstur, sum merkir at verða føddur av nýggjum, ella føddur av Heilaga Andanum.

Dópurin er vanliga tann gerningurin, sum er í kjalarvørrinum av frelsuni, tí tá kunngera vit, at nú verður tað gamla menniskja jarðað, og nýggja menniskja reisir upp til at liva eitt nýtt lív.

Róm. 6,4: Vit eru tá grivin við Honum við dópinum til deyðan, fyri at, eins og Kristus varð reistur upp frá hinum deyðu við dýrd Faðirsins, so skulu eisini vit liva nýtt lív.

Og Paulus sigur í Galatiabrævinum 2,20: Eg eri krossfestur við Kristusi, og nú er tað ikki longur eg, sum livi; nei, Kristus livir í mær, og lívið, sum eg nú livi í holdinum, livi eg í trúnni á Son Guds, sum elskaði meg og gav Seg sjálvan fyri meg.

Í samkomuni hava vit í langa tíð regluliga mint á týdningin av at kenna sín samleika í Kristusi. Hetta er júst fyri at venja okkara hugsunarhátt við, at vit eru nýggir skapningar, og orsøkin til okkara trekleika at skilja hetta, er, at vit merkja alla tíðina nærveruna av gamla menniskjanum.

At liva eitt nýtt lív merkir ikki, at Gud skiftir okkara kenslur út, ella sál okkara ella hugsanir okkara. Nei Gud gevur okkum Heilaga Andan, og okkara arbeiði er at geva Heilaga Andanum rúm, so Hann kann ávirka okkara hugsunarhátt, okkara gerðir ja í heila tikið alt okkara lív og lívsmynstur. Vit mugu loyva Heilaga Andanum at geva okkum nýggjar hugsanir og nýggjar kenslur, so okkara lív kann samsvara við nýggja menniskja, sum býr innan í okkum vegna Heilaga Andan, sum er givin okkum.

Tíanverri verður Heilaga Andans lív ofta parkerað innan í okkum, sum ein trygd fyri tað æviga lívið, so vit koma til Himmalin, tá vit einaferð skulu hiðani. Og Heilagi Andin er trygdin fyri æviga lívinum; men Hann er meir enn eitt framtíðarlív. Hann er eitt satt Himmalskt lív innan í okkum, sum er ein kraft til lívsumbroyting í dag – í hesum jarðarlívi okkara.

Róm. 6,11 sigur: Soleiðis skulu eisini tit rokna tykkum sum deyð frá syndini, men livandi fyri Gudi í Kristi Jesusi.

Og hetta er okkara andaliga arbeiði, at venja hugsan okkara til at fevna at „Eg eri ein nýggjur skapningur“ og mítt natúrliga menniskja er deytt og jarða.

Vit fara fyrst í september at brúka nakrar sunnudagar til at undirvísa í, hvussu vit skulu arbeiða okkum úr sinnisstøðuni av gamla menniskjanum, og inn í nýggju fatanina av, at vit eru nýggir, undurfullir og fullkomnir himmalskir skapningar.

Eg vil eggja tær til at koma til morgunmøti, so tú kanst fáa lut í hesi undirvísing, so vit saman kunnu vaksa inn í eitt lív, sum er merkt av, at vit eru reist upp til nýtt lív í Kristi Jesusi.

*tj*

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

*Samkomuleiðslubólkurin*

# OKTOBER 2021

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 2. | | **Reingerð:** Nomi og co. |
| Sunnudagur | 3. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti við breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Sunnudagsskúli** |
| | | | Møtivertar: Majbritt, Anton Petur og Fríðbjørn |
| | | | Leiðari: Anna |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., Øll |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Tummas J. |
| | | | Kaffivertar: Majbritt, Anton Petur og Fríðbjørn |
| Mánadagur | 4. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Anna |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 9. | | **Reingerð:** Karin og co. |
| Sunnudagur | 10. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Sunnudagsskúli** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári |
| | | | Leiðari: Ása O. |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Eyðfríð |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Tummas J. |
| | | | Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 11. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: Tummas |
| | | | Lovsongsleiðari: Jacobina |
| Leygardagur | 16. | | **Reingerð:** Ruby og co. |
| Sunnudagur | 17. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti við breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Sunnudagsskúli** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður |
| | | | Leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Aron |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Dávid |
| | | | Talari: |
| | | | Kaffivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður |
| Mánadagur | 18. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd: |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J. |
| Leygardagur | 23. | | **Reingerð:** Anna og co. |
| Sunnudagur | 24. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti** |
| | | Kl. 11.45 | **Sunnudagsskúli** |
| | | | Møtivertar: Merlie, Leif og Linda |
| | | | Leiðari: Marner |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur III |
| | | | Uppvørpa: Sólrún |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Alex |
| | | | Kaffivertar: Merlie, Leif og Linda |
| Mánadagur | 25. | Kl. 20.00 | **Lovsongs- og tilbiðjanarmøti** |
| | | | Ábyrgd: Tummas |
| | | | Lovsongsleiðari: Jacobina |
| Fríggjadagur | 29. | | **HEYSTSTEVNA** |
| Leygardagur | 30. | | **Reingerð:** Conny og co. |
| | | | **HEYSTSTEVNA** |
| Sunnudagur | 31. | Kl. 11.00 | **HEYSTSTEVNA** |
| | | Kl. 11.45 | **Sunnudagsskúli** |
| | | | Møtivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |
| | | | Leiðari: |
| | | | Lovsongsleiðari: |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: |
| | | | Kaffivertar: Áshild, Linjon og Eyðbjørg |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

# Heyststevna
# í Filadelfia

## 29., 30. & 31. oktober

**Húsið Vón & Filadelfia**